

## 16 ára gomul eigur sjey børn

Fyri aðru ferð hevur ein bert 16 ára gomul genta í Argentina fingið tríburar. So nú er hon mamma til sjey smágentur. Gentan, sum rópar seg Pamele, er longu ein roynd mamma, nú hon fyri aðru ferð fær tríburar. Fyrsta barnið varð borið í heim, tá mamman var 14 ár. 15 ára gomul fekk hon tríburar, og sum sagt, aftur nú tríburar, bert 16 ára gomul. Sambært danska Ekstra Blaðnum siga argentinsku læknarnir, at mamma og børn hava tað gott. Myndugleikarnir hava givið familjuni jørð, har tey kunnu byggja sær eitt heim.

# Maria Guttesen við nýggjari fløgu

**8. mars gevur føroyska songkvinnan Maria Guttesen út dreymaverk sítt**

FLØGUÚTGÁVA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



8. mars gevur føroyska songkvinnan Maria Guttesen út dreymaverk sítt, fløguna Wide Open, har Maria hevur sungið, framleitt og spælt øll ljóðføri sjálv.

Wide Open er fjóðra útgávan hjá Mariu Guttesen. Her vísir hon dygdirnar sum ein multitónleikari, ið spælir á at kalla øll ljóðføri. Við hesu fløgu er hon farin aftur til tað upprunaliga, og hevur sjálv spælt øll ljóðføri inn. Bert ein teknikari hevur hjálpt við at trýsta á upptøkuknappin.

Dreymurin hjá Mariu hevur tó altíð verið ein útgáva, har hon kundi brúka seg sjálvan 100 prosent. Eftir drúgvar royndir við ymsum tónleikaverkum, tónleikaundirvísing og sum tónleikacoach var tíðin komin at fara inn í tað innasta og leita fram tað ljóðið, ið er The Sound of Maria.

– Nústani var eg til reiðar at taka við avbjóðingini og gera tað, ið eg kendi eg skuldi, sigur Maria Guttesen. Og tað var júst tað, ið var ætlanin hjá Mariu:

- At gera eina fløgu, sum eri eg 100 prosent, sum vísur meg sum tónleikarar, komponist og songkvinnu. Hetta er ein fløga har eg eri farin so langt inn í tónlistaligu sál mína sum ongantíð áður, sigur hon.

Maria Guttesen hevur staðið fyri øllum tí tónlistarliga sjálv, men tað er Lene Drachmann, ið eigur øll orðini á fløguni.

- Eg vóni at lurtarin kennur, at Wide Open er ein glað og positiv fløga, hóast hon er merkt av álvarsligu tulkingum og arrengementum mínum, sigur Maria og flennir, tí hon gleðir seg til at lata umheimin inn í tónleikaunivers sítt við fløguni Wide Open.

# Føroyskir pápar skulu í barnsburðarfarloyvi

**Landsstýrið arbeiðir nú av álvara fyri at fáa eina pápakvotu inn í barsilsskipanina, so allir pápar skulu heim við barninum í eitt tíðarskeið.**

VINNUMÁL
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Tað hevur leingi verið sum at vísa tarvi reytt at tosa um pápakvotur í sambandi við barnsburð. Kortini var hetta júst tað, sum landsstýriskvinnan í vinnumálum, Bjørt Samuelsen, greiddi frá á tingfundinum í gjár: At hon arbeiðir við at innføra eina pápakvotu á barnsburðaøkinum. Sambært Bjørt Samuelsen er endamálið fyrst og fremst at javnstilla mammur og pápar á arbeiðsmarknaðinum, eftirsum at tað hevur verið ført fram í seinastuni, at arbeiðsgevarar velja kvinnur frá, tí tær skulu heim í barnsburðarfarloyvi. Fara páparnir eisini heim, vera teir eins lítið attraktivir og mammurnar á hesum økinum.

Sambært Bjørt Samuelsen skal ein skipan við pápakvotu byrja í smáum, og byggjast út so líðandi.

Nakrir tingmenn undraðust á, at ætlanin er at diktera menninir heim, men kortini var rættiliga breið semja um, at ein slík skipan hevði gagnað javnstøðuni.

Ein pápakvota hevði ivaleyst verið rættiliga kostnaðarmikil fyri barsilsgrunnin, tí føroyskar mammur forvinna í miðal 16.000 kr. um mánaðin, meðan menninir liggja uml. 26.000 kr.

Undir orðaskiftinum varð ikki tosað so nógv um at leingja farloyvi upp í 52 vikur, sum ført hevur verið fram. Men Andrias Petersen úr Javnaðarflokkinum, ið sum kunnugt er lækni, segði, at tosið um at leingja farloyvið upp í kanska tvey ár, hevði ikki verið ein fyrimunur fyri børnini. Fyri menningina hava tey tørv á at koma út millum onnur børn, tá tey eru uml. 9 mánaðir. Eisini vísti hann á, at var farloyvið so drúgt, vórðu mammurnar veruliga afturúrsigldar á arbeiðsmarknaðinum.



# Leivdir frá barnalíkum nærhendis barnaheimi

**Løgreglan hevur funnið leivdir frá barnalíkum við fyrrverandi barnaheim á bretsku oynni Jersey. Illgruni er um, at barnaheimsbørnini vóru offur fyri ágangi og morði.**

KRIMI
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Ein sonn ræðusøga kemur í hesum døgum undan kavi á einum fyrrverandi barnaheimi á bretsku oynni Jersey.

Sambært BBC hevur løgreglan funnið leivdir frá barnalíkum inni á barnaheiminum Haut de la Garenne.

Heimið er longu frammanundan í ljósmálanum hjá løgregluni, tí illgruni er um, at børnini vóru sera illa viðfarin longu afturi í 1960´unum. Fyribils kanningar vísa, at líkleivdirnar stava frá byrjanini av 1980'unum. Kanningarleiðarin hjá løgregluni í Jersey, Lenny Harper, sigur við BBC, at helst finna tey fleiri leivdir frá líkum, tí sporhundar hava víst serligan áhuga fyri seks onnur støð í og uttanfyri heimið. Tí eru serfrøðingar úr London boðsendir at hjálpa við kanningararbeiðinum.

- Um tørvur er á tí, so halda kanningarnar fram í fleiri vikur. Enn vita vit ikki, um talan er um morð, ella um vit finna fleiri lík, sigur Harper.

Fyrrverandi parlamentslimur fyri Jersey, Stuart Syvret, heitir á øll, sum hava havt samband við barnaheimið, um at traðka fram, so tey kunnu hjálpa løgregluni.



*Haut de la Garenne er í dag vallaraheim*